# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Summarið er komið

Aftur og aftur verða vit mint á, hvussu ríkt okkara land og samfelag er. Ikki minst í hesi vikuni og hesum vikuskiftinum er so nógv, sum undirstrikar, at mentanarliga virksemið er so stórt, sum tað kanska ongastaðni er í heiminum, tá ið fólkatalið verður havt í huga.

Tað var undir sváru kreppuni í tríati árunum, at tey í Klaksvík tóku seg saman at halda Norðoyastevnu. Stevnan hevur síðani verið mest sum fastur fúsur at boða frá sumrinum, og í framsýningum, fólkafundum, andaligum samkomum og ítrótti er tað framúr, hvat tað verður avrikað í Klaksvík.

Tað kann væl vera, at tey, sum hava sína dagligu gongd har norðuri, ikki duga at síggja og harvið at skatta, hvussu ríkt mentanarlívið er. Men tá ið tað ber til at fara til Klaksvíkar tríggjar ferðir næstu vikurnar at vera við til stórfingin tiltøk, so boðar hetta frá arbeiðssemi og hugflogi, sum eru framúr.

Leygardagin verður fyrsti FM kappróðurin á vánni í Klaksvík. Hóast kappróður var á Strondum síðsta leygardag, so er FM róður nakað heilt annað, og harvið verður tað ikki fyrrenn leygardagin, at ábendingar verða um, hvussu støðan er.

Samstundis sum klaksvíkingar leggja síðstu hond á fyrireikingarnar til Norðoyastevnu, so arbeiða teir eisini við bæði festivali og sjómannadegi! Og so eigur at verða lagt aftrat, at hesa ferð hava teir lagt truckerfestivalin saman við Norðoyastevnuni.

Norðoyastevnan ber boð um summarið. Í høvuðsstaðnum hava tey seinastu árini skipað fyri mentanarnátt fyrst í juni mánað. Skráin boðar frá, at útboðið er fantastiska stórt og spennandi. Og fyri tey, sum kanska ikki kenna seg heima á Norðoyastevnu ella á mentanarnáttini, er enn ein møguleiki í vikuskiftinum. Í Skálafirði verður skipað fyri Fjarðafestivalinum!

Árstíðirnar halda sína ringrás, og veðrið ræður sær sjálvum. Næstu vikurnar eru fyritreytirnar hjá myrkrinum vánaligar, og hesar seinastu vikurnar hevur veðrið verið framúr. Tað ber við sær, at lagið er gott, og at trongdin til at sleppa út at heilsa upp á fólk og at vera við til at skapa góðan hýr verður størri.

Grundarlagið undir mentanarvirkseminum verður lagt í gerandisdegnum kring landið alt. Skúlarnir røkja sín stóra setning, musikkskúlarnir hava víst seg at vera framúr íkast, ítróttarfeløgini, skótarnir, sjónleikarafeløgini, ítróttarfeløgini, talvfeløgini, listafeløgini, sangkórini - og vit kundu hildið fram – eru við til at styrkja sannleikan undir orðunum hjá Bernhardi Brim, sála, tá ið hann í kvøðuni til Klaksvíkar sigur, at "her er menning og nørandi gróður".

Gott summar ynskja vit øllum!

**Sosialurin**

## Vinnast skal á Deyðans Dali innan nýskapan



**ÓLAVUR GREGERSEN**
Stjóri í Bitland p/f

Á ìverksetaradegnum fríggjadagin røddi Johan Dahl, landsstýrismaður í Vinnumálum. Hann nevndi m.a., at ein stórur trupulleiki fyri íverksetan og nýskapan er sonevndi "Deyðans Dalur Nýskapaninar", ella "the Death Valley of Innovation"

Hetta er eitt vælkent fyribrigdi innan nýskapan úti í heimi. Íverksetarar hava rímuligar møguleikar fyri at vinna framá við sínum hugskotum, og megna at prógva, at hugskotið ber til – sonevnt "Proof of Concept". Men næsta stigið krevur pening – sum oftast nógvan pening. Tað er tá ið hugskotið skal mennanst í mun til marknaðartørvin, og somuleiðis marknaðarfarst og setast í verk í rakstrarligum høpi.

Royndir vísa, at tað tekur drúgva tíð at fáa tann neyðuga peningin til henda partin. Í Føroyum er hetta serliga galdandi, um talan er um nýskapandi hugskot, sum leggur seg eftir útlendska marknaðinum, og sum byggjur á at menna útflutning burturúr nýggjari vitan.

Landsstýrimaðurin segði, at Vinnumálaráðið fer at kanna nærri, hvussu vinnast kann á Deyðans Dali innan nýskapan.

**Álvarsamur trupulleiki**

Í Bitlandi er tað okkara fatan, at landsstýrimaðurin nemur við ein sera álvarsligan trupulleika hjá íverksetarum við nýskapandi hugskotum. Bitland kemur í samband við mong av teim nýskapandi átøkum, sum føroyskir íverksetarar arbeiða við – serliga í mun til altjóða marknaðin. Við teimum átøkum, sum gjørd eru hesi seinastu 10 árini, eru fleiri verkætlanir komnar inn ímóti munnanum á hesum "Deyðans Dali innan nýskapan" ella koma har í næstum.

Vert er at hava í huga, at sum oftast gongur rúm tíð frá hugskotið birtist, til fyrsti fakturin verður skrivaður – serliga um hugskotið er slóðbrótandi. Kanningar uttanlands siga 3-5 ár, um væl gongst í hond. Tað eru nógv viðurskifti, sum skulu hepnast frá stovnan til fyrsta "protoypan" er til taks. Tíbetur eru tó fleiri verkætlanir í gongd í dag, sum bróta burturúr nýggjum og sum miðja eftir altjóða marknaðinum. Samlaða metta marknaðarvirðið av hesum verkætlanum er helst omanfyri 10 mia. kr. Um vit brúka ein "hepni-faktor" uppá 25%, so verður samlaða potentialið á verkætlanunum 2,5 mia. kr. (0,25x10 mia. kr). Tær flestu av hesum fyritøkum koma í ár inn í henda "Deyðans Dal", tí teimum tørvar íløgupening til framhaldandi vøru- og marknaðarmenning.

Upphæddirnar eru eisini størri enn tað, sum vanliga verður latið sum stuðul og íløgukapital í Føroyum. Helst er tørvurin okkurt um 5-20 mió. kr. fyri hvørja fyritøku sær. Talan er um íløgu í menning, tvs. at peningurin verður einamest brúktur til at løna starvsfólkum við røttu førleikunum og til aðrar rakstrarútreiðslur. Tað ger, at vanlig lánifígging er ikki hóskandi, tí einki hondpant sum t.d bygningar ella maskinur eru at seta í veð.

Einstaki íverksetarin kann helst lata sær lynda við minni kapitali, soleingi hann ella hon kann bjarga sær gjaldførinum nakrar mánaðir fram. Men fyri samfelagið og fyri íleggjarar fæst ikki nøktandi úrslit á henda hátt. Skal nakað verulígt úrslit spyrjast burturúr, sum hevur samfelagsligan áhuga, skulu kreftur setast av til tað – m. a. fyri at ikki at blíva afturúrsilgdir av kappingarneytum úti í heimi.




Ein leyslig meting er, at í ár er tørvur á okkurt um 100 mió. kr. í vágafúsum íløgukapitali, um verandi nýskapandi íverksetarafyritøkur ikki skulu steðga upp. Harumframt skal peningur eisini setast í nýggjar fyritøkur. Hesin peningurin skal í stóran mun koma frá føroyskum íleggjarum. Okkara royndir eru, at útlendskir íleggjarar sum oftast seta sum treyt fyri teirra áhuga, at føroyskir íleggjarar standa fyri bróðurpartinum av eini vágafúsari íløgu.

**Loysnir eru ávístar**

Um fyritøkurnar ikki megna at fáa hesa fígging, so er stórur vandi fyri, at føroyska samfelagið missur iverksetarar av landinum, sum hava evni og førleikar til at tróta altjóða marknaðarmøguleikar innan nýskapandi vinnur.

Ymsar loysnir hava verið ávístar seinastu árini, men higartil hevur lítið ítøkiligt verið at sæð í mun til hesi uppskot, t.d. ítøkiligu tilmælini í Visjón 2015-arbeiðnum.

OECD vísir á, at tað er vakstaríverksetan, sum er altavgerðandi fyri, um eitt samfelag kann mennast og vaksa um sína virðisskapan. Tí eiga samfeløg eisini at raðfesta íløgur í íverksetan, so at orkan verður nýtt til íverksetarar við vakstarpotentiali.

Rætt hevur verið framm undir, at partur av tí tøka peningi, sum er í landsins 25 grunnum, skal brúkast til gransking, vøkstur o.a. Løgmaður hevur sagt, at um samgongan kemur ásamt um at gera broytingar í virkseminum fyri hesar grunnar, so verða neyðug stig tikin, herundir eisini møguligar lógarbroytingar.

Í USA hevur m.a. stjórin í Innovation America www.innovationamerica.us) í vár víst á tørvin fyri samstarvi millum almennar stovnar og privat feløg fyri at bera so í bandi, at íverksetan innan nýskapan vinnur upp úr "Deyðans Dali".

Um vit eru fim og skjót, so kunnu vit bjóða okkum fram í altjóða høpi at seta í verk og gagnnýta nýggja vitan og tøkni – veruliga fremja nýskapan, sum skapar virðir fyri vinnu og samfeløg. Megna vit tað, so vilja onnur verða við til at lata fígging til at fremja slíkar verkætlanir. Vit hava fleiri dømi um slíkar verkætlanir í Føroyum. Summar eru fingnar til høldar, og aðrar eru í umbúna. Altjóða samstarv er bæði ein fortreyt og er tvingandi neyðugt í hesum høpi.

Felags eyðkenni higartil hevur verið, at almenna skipanin hevur ikki í nóg stóran mun tikið við tí ábyrgd, sum hvílur á henni, um avgerðir skulu takast um at koma framá og burturúr Deyðans Dali innan nýskapan.

Vónandi fer landsstýrismaðurin at raðfesta hetta álvarsmál frammaliga í komandi tíðum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.